Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 04/11/2025
Mál nr.: 24/28244
Málsviðgjørt: ABD/SSJ

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
Galdandi orðingar	**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023, verða gjørdar hesar broytingar:
4) Smáar fyritøkur: Fyritøkur, sum fíggjarjavnadagin tvey fylgjandi roknskaparár ikki fara upp um tvey av hesum støddarmørkum: a) ein fíggjarjavna upp á 36 mió. kr., b) ein nettoumsetning upp á 72 mió. kr., og c) eitt miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 50. 5) Miðalstórar fyritøkur: Fyritøkur, sum ikki eru smáar fyritøkur, og sum fíggjarjavnadagin tvey fylgjandi roknskaparár ikki fara upp um tvey av hesum støddarmørkum: a) ein fíggjarjavna upp á 143 mió. kr.,	1. § 1 a, stk. 1, nr. 4-6 verður orðað soleiðis: “ 4) Smáar fyritøkur: Fyritøkur, sum lúka støddarmørkini í § 7, stk. 2, nr. 1 í ársroknskaparlógini, sbr. § 7, stk. 3 og 4 og § 131, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini. 5) Miðalstórar fyritøkur: Fyritøkur, sum lúka støddarmørkini í § 7, stk. 2, nr. 2 í ársroknskaparlógini, sbr. § 7, stk. 3 og 4 og § 131, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini. 6) Stórar fyritøkur: Fyritøkur, sum ikki eru smáar ella miðalstórar fyritøkur sambært § 7, stk. 2, nr. 3 í ársroknskaparlógini, sbr. § 7, stk. 3 og 4 og § 131, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini.”

b) ein nettoumsetning upp á 286 mió. kr., og c) eitt miðaltal upp á 250 av heiltíðarsettum starvsfólkum gjøgnum roknskaparárið. 6) Stórar fyritøkur: Fyritøkur, sum ikki eru smáar ella miðalstórar fyritøkur.	
Stk. 2. Tá støddin á fyritøkuni skal roknast eftir stk. 1, nr. 4 og 5, skal § 7, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini nýtast, sbr. tó stk. 3. *Stk. 3.* Fyri móðurfyritøkur verður fíggjarjavni, nettoumsetningur og miðaltal av heiltíðarsettum í roknskaparárinum, sambært stk. 1, nr. 4 og 5, roknað á tann hátt, at fíggjarjavni, nettoumsetningur og talið av heiltíðarsettum hjá móðurfyritøku og dótturfyritøku verður lagt saman. Tá støddin eftir 1. pkt. verður roknað, er § 110, stk. 2 og 3 í ársroknskaparlógini galdandi.	2. § 1 a, stk. 2 og 3 verða settar úr gildi.
Stk. 3. Uppgávur sambært stk. 1, nr. 5 skulu gerast í einum grannskoðanarvirki. Góðkenning sum løggildur grannskoðari kann einans verða fingin, um uppgávurnar eru undir eftirliti av góðkendum grannskoðara.	3. Í § 3, stk. 3 verður " nr. 5" broytt til nr. "nr. 6".
Stk. 4. Skráseting Føroya kann geva undantak frá treytini í stk. 1, nr. 5.	4. Í § 3, stk. 4 verður "nr. 5" broytt til "nr. 6".
Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um tryggingina sambært stk. 1, nr. 6, heruppií um vavið og slagið av trygging og um tíðarskeiðið, tryggingin fevnir um.	5. Í § 3, stk. 5 verður "nr. 6" broytt til "nr. 7".
§ 7. Góðkenning sum grannskoðari fellur burtur, um treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1-3 ella 6 ikki longur eru loknar.	6. Í § 7, stk. 1 verður "6" broytt til "7".
Stk. 2. Eftir áheitan frá Skráseting Føroya skal grannskoðari prógva, at hann er tryggjaður sambært § 3, stk. 1, nr. 6.	7. Í § 7, stk. 2, 1. pkt. verður "nr. 6" broytt til "nr. 7". ".
Tað er ein fortreyt, at treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1-3 og 6 og § 4 eru loknar, og at viðkomandi ikki hevur eina falna skuld til tað almenna upp á 100.000 kr. ella meira.	8. Í § 9, stk. 2, 2. pkt. verður "6" broytt til "7".

Um grannskoðanin er framd eftir váttanarstandardi, sambært § 135, stk. 1, 2. pkt. í ársroknskaparlógini, og grannskoðarin tí hevur givið eina váttan um víðkaða gjøgnumgongd, er 1. pkt. ikki galdandi.	9. Í § 16, stk. 1, 2. pkt. verður "§ 135, stk. 1, 2. pkt." broytt til "§ 158, stk. 1, 2. pkt."
§ 42. Ein grannskoðari, ið setir til síðis tær skyldur, ið fylgja við starvinum, tá hann fremur uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3, kann frá Grannskoðaranevndini fáa eina ávaring ella eina bót upp á í mesta lagi 300.000 kr.	10. Í § 42, stk. 1, 1. pkt. verður "bót" broytt til "sekt".
Stk. 6. Um tað áliggur einum grannskoðanarvirki ein sjálvstøðug ábyrgd, sbr. § 41, stk. 5, ella ein medábyrgd fyri, at grannskoðarin ikki hevur hildið sínar skyldur, sbr. stk. 1, kann grannskoðanarvirkið fáa eina ávaring ella eina bót, upp á í mesta lagi 750.000 kr.	11. Í § 42, stk. 6, 1. pkt. verður "bót" broytt til "sekt".
Stk. 9. Bøtur, ið eru álagdar sambært stk. 1 og 6, kunnu innheintast við panting. Peningurin fer í landskassan.	12. § 42, stk. 9, 1. pkt. verður orðað soleiðis: "Sektir, ið verða álagdar sambært stk. 1 ella 6, kunnu innheintast við panting."
Stk. 4. Bøtur, ið verða álagdar sambært stk. 1, kunnu heintast inn við panting.	13. § 42 b, stk. 4 verður orðaða soleiðis: "Sektir, ið verða álagdar sambært stk. 1, kunnu innheintast við panting."
Galdandi orðingar	**§ 2.** Í løgtingslóg nr. 50 frá 4. mai 2021 um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, verða gjørdar hesar broytingar:
2) Anordning om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven.	1. § 2, stk. 1, nr. 2 verður orðað soleiðis: "Løgtingslóg um ársroknskapir og samtaksroknskapir".
Galdandi orðingar	**§ 3.** Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 26. mars 2024, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 42 a. Kapitalfelagsins útvegan av ognum frá stovnara skal góðkennast av aðalfundinum, um: 1) útveganin fer fram í tíðini frá dagfestingingi av undirskrift á	1. Í § 42 a, stk. 1 og 2 verður "Kapitalfelagsins" broytt til "partafelagsins".

stovningarskjali og til 24 mánaðir eftir, at partafelagið er stovnað, og 2) viðurgjaldið samsvarar við í minsta lagi 1/10 av felagskapitalinum. *Stk. 2.* Høvuðsleiðsla kapitalfelagsins skal til nýtslu í sambandi við aðalfundarinnar avgerð um góðkenning gera eina frágreiðing um tær nærri umstøðurnar viðvíkjandi útveganini.	
Eitt partabrævaskjal, sum er givið út til handhava, verður verandi handhavaskjal, hóast tað, av kapitalfelagnum, á partabrævaskjalið verður áteknað, at navn eigarans er uppskrivað, um so er, at navn ikki er skrivað á partabrævaskjalið.	2. Í § 66, stk. 1, 3. pkt. verður "kapitalfelagnum" broyt til "partafelagnum".
2) tiltakspeningur, undantikið tiltakspeningur sbrt. §§ 35 a og 35 b í ársroknskaparlógini, sbr. tó stk. 2.	3. Í § 165, stk. 1, nr. 2 verður "§§ 35 a og 35 b" broytt til "§§ 38-39".
8) leiðsla felagsins eingi stig hevur tikið viðvíkjandi krøvum felagsins upp á innkallaðan felagskapital, ið hava víst seg ikki at kunna lúkast.	4. Í § 225, stk. 1, nr. 8, verður "lúkast." broytt til "lúkast, ella"
Stk. 5. Kapittul 3 um stovnan, kapittul 10 um at hækka kapitalin og kapittul 14 um at avtaka kapitalfelagið verða ikki at nýta í sambandi við eina kloyving uttan so, at tað skilst á ásetingunum um kloyving, sbr. §§ 254-270.	5. § 268, stk. 5 verður orðað soleiðis: "Kapittul 3 um stovnan, kapittul 10 um at hækka kapitalin, kapittul 11 um frágongd av kapitali og kapittul 14 um at avtaka kapitalfelagið verður ikki at nýta í sambandi við eina kloyving uttan so, at tað skilst á ásetingunum um kloyving, sbr. §§ 254-270."
3) deildarleiðarin ikki hevur sent Skráseting Føroya møguliga grannskoðaða ársfrásøgn fyri útlendska felagið í samsvari við §§ 143 og 144 í ársroknskaparlógini, og hetta ikki verður rættað í seinasta lagi, tá ein freist, ásett av Skráseting Føroya, er farin,	6. Í § 302, stk. 1, nr. 3 verður "§§ 143 og 144" broytt til "§§ 174 og 175".
§ 303. Um serlig samfelagsáhugamál tala fyri hesum, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um, at reglurnar fyri partafeløg og serligu reglurnar fyri landspartafeløg í hesi lóg og ársroknskaparlógini, sum lógin er sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan, sbr. tó §§ 304 og 305 í hesi lóg, verða at nýta fyri landspartafeløg, sbr. § 5, nr. 26.	7. § 303 verður orðað soleiðis: "Um serlig samfelagsáhugamál tala fyri hesum, kann landsstýrisfólkið áseta reglur um, at reglurnar fyri partafeløg og serligu reglurnar fyri landspartafeløg í hesi løgtingslóg og í ársroknskaparlógini, sbr. tó §§ 304 og 305 í hesi løgtingslóg,

	verða at nýta fyri landspartafeløg sambært § 5, nr. 26.”
Galdandi orðingar	**§ 4** **Gildiskoma og skiftisreglur** Løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2026 við virknaði fyri roknskaparár, sum byrja 1. januar 2026 ella seinni, sbr. tó stk. 2. *Stk. 2.* § 1, nr. 3-14 koma í gildi dagin eftir, at løgtingslógin er kunngjørd.